

## Obama sendi loyniligt bræv

Fyri góðum fjúrtan døgum síðani fekk russiski forsetin, Dmitrí Medvedev, eitt loyniligt bræv frá amerikanska starvsbróðuri sínum, Barrack Obama. New York Time veit at siga, at ein ein serligur sendimaður fekk boð um nat handa russiaka forsetanum brævið, ið snúði seg um kjarnorkuverkætlanina hjá Iran. Sambært blaðnum skal Obama hava skrivað, at USA er til reiðar at sleppa ætlanini um rakettverjuútgerð í Kekkia og Póllandi, um iranar afturfyri gevast við sínum kjarnorkuætlanum. Russland hevur mótmælt amerikonsku rakettverjuætlanini, men hevur hinvegin hjálpt Iran.

## Leggja trýst á Karzai

Ætlanin hjá afghanska forsetanum, Hamid Karzai, at halda forsetaval í næsta mánað er ikki fallin í góða jørð í Washington. Tað hevur forsetin eisini fingið greitt at vita frá amerikanska stjórnarsendimanninum Alain le Roy, skrivar BBC. Forsetaskeiðið hjá Karzai er úti tann 21. mai. Upprunaliga ætlaði forsetin at hava forsetaval í august, men andstøðan legði hann undir at leingja valskeiðið uttan heimild. Tí gjørdi hann av at flyta valið til apríl, men sambært amerikonsku stjórnini ber tað ikki til at halda eitt rættvíst val nú, soleiðis sum viðurskiftini í Afghanistan eru.

# Tjóðveldi á ting við 19 uppskotum

**Seinasti framløgudagur av uppskotum í Løgtinginum var fríggjadagin, og sum størsti andstøðuflokkur legði Tjóðveldi fram 19 nýggj uppskot. Fimm uppskot verða eisini løgd fram, sum hava verið fyri í tinginum áður**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á einum ikki serliga væl vitjaðum tíðindafundi mánadagin greiddi Tjóðveldi í stuttum frá innihaldinum í nøkrum av teimum 19 nýggju uppskotunum, sum flokkurin hevur lagt fyri tingið, nú seinasta freist fyri framløgu var farna fríggjadag.

Uppskotini fevna um alt frá fullveldi til kringvarpsgjald, og felags fyri tey flestu er, at tey eru løgd fram sum eitt upplegg til kjak, heldur enn í einari veruligari vón um at tey verða samtykt. Soleiðis er nú lagnan einaferð hjá andstøðuuppskotum.

Fleiri av uppskotunum eru annars sera viðkomandi, ikki minst uppskotið um at lógargeva um at fáa rogn og livur til lands, so henda rávøra kann gagnnýtast. Tað uppskotið fara vit at venda aftur til í einum av komandi bløðunum.

Tað verður kanska heldur rúgvismikið at nevna øll tey 19 nýggju uppskotini og tey fimm, sum hava verið ella eru til viðgerðar í einum, men úr rúgvuni kunnu vit nevna Kringvarpsgjald, Tilfeingisbúð og nýtsla av fiskidøgum, Rogn og livur upp á land, Maritim gransking – toskaaling v.m., Menning av varandi orkukeldum og Byggilóggáva.

Eitt av uppskotunum, sum tað allarhelst er semja um millum tingfólk, er at avtaka kringvarpsgjaldið og í staðin krevja hetta inn um skattaskipanina. Men hóast ein meiriluti er í Løgtinginum fyri hesum, verður uppskotið neyvan samtykt, tí Fólkaflokkurin er ímóti, og so stendur samgongan solidarisk í málinum.

Eitt annað uppskot, sum nú er lagt fyri Løgtingið, er ein áheitan á landsstýrið um at arbeiða meiri við varandi orku.

### Varandi orka

Undir undanfarnu ABC-samgongu varð royndarætlan sett í verk, sum skuldi gera Nólsoy til eina sonevnda grøna oyggj, men hóast royndir og hagtalstilfar er savnað, er hendan verkætlan nú slept. Eitt av uppskotunum hjá Tjóðveldi snýr seg júst um varandi orku, hóast Nólsoyarætlanin ikki verður nevnd. Uppskotið hjá Tjóðveldi er soljóðandi:

»Løgtingið heitir á landsstýrið um at:

- Gera eina miðvísa ætlan fyri menning av varandi orukeldum, og leggja hesa fyri løgtingið til viðgerðar.
- At landsstýrið syrgir fyri, at øll almenn nýbygging og umbygging er orkusparandi og nýtir varandi orkukeldur
- At orkusparingarætlan verður gjørd fyri allar almennar bygningar
- At landsstýrið í sínum figgjarlógaruppskoti fyri 2010 og komandi árini setir munandi upphædd av til menning av varandi orkukeldum
- At almennar stuðulskipanir til bygging, umbygging, húsakeyp o.l. verða umlagdar soleiðis, at tær stimbra húsarhaldum og vinnuni, at spara orku og royna varandi orkukeldur sum hitaskipan til hús og bygningar.
- At melda greitt út, hvør orkupolitikkur landsins er og hvør vinnupolitikkurin er í mun til at stimbra eina vinnu innan varandi orkukeldur
- og at Føroyar virkið luttaka í teimum samstørvum millum londini, ið fer fram til tess at menna varandi orkukeldur«.

### Ógreið ábyrgd

Bjørt Samuelsen, sum er framsøgukvinna í vinnu- og orkumálum fyri Tjóðveldi, sigur, at ætlanin við uppskotinum er í fyrstu syftu at skapa eitt mennandi og drúgt kjak um spurningin um varandi orku.

- Tað má vera upplagt fyri eitt oyggjasamfelag, at miða ímóti at so stórur partur av orkuni kemur frá varandi orkukeldum, sum tilber. Ov mikið er av vindi í Føroyum, og sama er galdandi fyri bæði vatn og sjóvarfall, sum átti at verið orkukeldur, sum kunnu troytast á lutfalsliga lættan hátt. Við alduorku er helst truplari, tí har fæst minni burtur úr í mun til innsatsin, sigur Bjørt Samuelsen.

Hon sigur, at tað er við vilja, at einki verður sagt um nakra ítøkiliga verkætlan í uppskotinum, men fyri tað heldur hon, at Nólsoyarætlanin avgjørt er áhugaverd.

- Sjálv umsat eg ikki hetta øki, tá eg var vinnumálaráðharri, og eg dugi ikki at siga, hví hendan ætlanin datt niður fyri. Men tað hendi undir undanfarnu ABC-samgongu, og tí er tað ikki rætt, tá tað verður skotið okkum í skógvarnar, at tað var CHE, sum lorkaði ætlanina á gólvið, sigur Bjørt Samuelsen.

Hon heldur, at ein av orsøkunum til, at so lítið verður gjørt við spurningin um varandi orku er, at tað er ógvuliga ógreitt, hvør varðar av málsøkinum.

- Tá vit skipaðu CHE-samgonguna, gjørdu vit nógv burtur úr júst hesum spurninginum, og tað varð enntá stovnað eitt tilfeingisráð (saman við fiskimálaráðnum, red). Sum vinnumálaráðharri umsat eg tí bert elveitingarlógina, meðan øll onnur orka lá undir fiski- og tilfeingismálaráðnum. Nú tykist stórur ivi valda um, hvør umsitur hetta øki, sigur Bjørt Samuelsen.

### Tvær flugur...

Framsøgukvinnan í orkumálum hjá Tjóðveldi sigur, at eitt annað av endamálunum við hesum uppskotinum er, at provokera landsstýrið at melda út um hvønn politikk, landsstýrið rekur á hesum økinum.

- Vit ynskja, at landsstýrið kemur við einari greiðari ætlan um orkupolitikkin í framtíðini, ikki bara ein her-og-nú politikk, men eina veruliga strategi fyri tey komandi tíggju árini. Hvørji eru málini, og hvørjum verður arbeitt fram ímóti, sigur Bjørt Samuelsen.

Hon sigur, at kemur landsstýrið við einari slíkari útmelding, so fer Tjóðveldi at viðgera hana við stórari vælvild.

- Vit meina tað í álvara, tá vit tosa um ein orkupolitikk. Vit eru til reiðar at satsa nógv upp á hetta, ikki bara við nøkrum symbolskum upphæddum á løgtingsfiggjarlógini, men við íløgum í 100-millióna flokkinum, sigur Bjørt Samuelsen.

Og spurningurin um varandi orku ávirkar eisini eitt annað og sera týdningarmikið mál, nevniliga spurningin um $CO_2$-útlát, sum Føroyar so ella so mugu taka upp. Ikki minst tí at føroyingar $CO_2$-dálka sera nógv lutfalsliga.

- So hvørt sum vit gerast minni tengd at oljuni í sambandi við orku, minkar eisini $CO_2$-útlátið, so hetta uppskotið um varandi orku hongur í stóran mun saman við einum øðrum uppskoti, sum vit hava lagt fyri tingið um »Ætlan um minking av $CO_2$-útláti«, sigur Bjørt Samuelsen.

So sigast kann, at við at økja um varandi orkuna, minka vit samstundis um $CO_2$-útlátið, og harvið fáa vit tvær flugur við einum slagi.




*Bjørt Samuelsen er framsøgukvinna hjá Tjóðveldi í sambandi við orku-, granskingar- og vinnumál*

*Mynd: Álvur Haraldsen*